

NÝGGJUR ALIBÁTUR

*Tvíkiljan, sum KJ Hydraulik fer at lata Bakkafrosti í morgin, er 13 metrar long og 6 metrar breið. Hon er vælútgjørd við motorum, stórum krana og spæli*

# Bakkafrost fær nýggjan alibát

**HANDVERK** Í morgin fær Bakkafrost ein nýggjan alibát, sum KJ Hydraulik á Kambsdali hevur smíðað. Hetta er triði báturin í røðini, sum stóra alifelagið á Glyvrum hevur latið smíðað í Føroyum

Vilmund Jacobsen

Seinnapartin í morgin fær Bakkafrost á Glyvrum ein nýggjan alibát. Hetta er ein tvíkilja av slagnum Hydro Cat, sum hesir bátar vera róptir. Tað er KJ Hydraulik á Kambsdali, sum eigur alt konseptið og hevur smíðað bátin.

Nýggi alibáturin hjá Bakkafrosti er hin triðji í røðini, sum føroyski veitarin hevur smíðað til felagið síðan 2007.

### Væl útgjørdur

Viggo Johannesen, sølustjóri hjá KJ Hydraulik, sigur, at hendan tvíkiljan er 13 metrar long og 6 metrar breið. Hon hevur tríggjar IVECO-motorar, tveir til framdrift og ein til generator og hydraulik.

Á dekkinum hevur báturin ein 23 tons stóran Palfinger sjókrana og spæl.

KJ Hydraulik, sum eigur alt konseptið til Hydro Cat alibátin, hevur í fleiri ár latið skrokkarnar smíðað í Letlandi, og síðan verður øll liðugtgerðin og allar instalatiónir gjørdar í Føroyum.

### 4-5 miljónir krónur

Viggo Johannesen, sølustjóri, sigur, at alibáturin, sum verður latin Bakkafrosti í Fuglafirði í morgin, kostar millum 4 og 5 miljónir krónur.

Felagið á Kambsdali hevur gjøgnum árini smíðað fleiri bátar til føroysku alivinnuna, og onkur einstakur bátur er eisini seldur uttanlands.

Í løtuni hevur KJ Hydraulik ikki fleiri sáttmálar um bátar til føroysku alivinnuna.

*vilmund@sosialurin.fo*



METPRÍSUR

*Fleiri keyparar vildu hava burtur av lastini hjá Vesturleika. Hetta førdi til, at skipið fekk ein metgóðan miðalprís fyri veiðina, sum løgd varð upp í Sørvági í dag*

# Methøgur prísur á upsa

**FISKIVINNA** Upsaprísurin er rættiliga góður í løtuni, og nú Vesturleiki landaði í Sørvági í morgun, fingu teir ein miðalprís, sum liggur omanfyri 8 krónur fyri kilo

Vilmund Jacobsen

Í dag landar Vesturleiki í Sørvági. Vesturleiki partrolar saman við Sjagakletti, sum landar í Hvalba í dag.

Skipini hava verið úti í einar 12 dagar og hava umleið 180.000 pund í part – ella eini 360.000 pund tilsamans.

Meginparturin av veiðini er upsi, men ein lítil partur er toskur.

Upsaprísurin er rættiliga góður í løtuni, og úr Sørvági verður sagt, at veiðan hjá Vesturleika er seld fyri ein miðalprís, sum liggur omanfyri 8 krónur fyri kilo.

Hetta er rættiliga góður fiskaprísur, og fleiri ymiskir keyparar eru til lastina hjá Vesturleika.

### Aðrar landingar

Landingarmiðstøðin í Sørvági fer eisini at landa línubátin Havbúgvan í morgin. Havbúgvin hevur verið undir Íslandi og hevur fingið eini 120.000 pund av brosmu, longu og toski.

Úr Sørvági verður sagt, at Vesturtúgvan væntandi kemur inn at landa fríggjadagin. Vesturtúgvan partrolar saman við Grønanesi, sum plagar at leggja veiðina upp í Vestmanna.

*vilmund@sosialurin.fo*